Dekkið er ætlað sum spenndekk elementir. Spenndekk elementir hava eina stóra spennivídd, og er hetta sera týdningarmikið fyri at fáa eina fleksibla innrætting.

Takið er uppbygt av stálbjálkum, ið skulu bera eina lætta takkonstruktión.

Høvuðsinngongdin til bygningin er kjarnan í bygninginum. Tað er bygt upp við beton elementum og er berandi fyri vind trýstinum, ið er á bygningin.

Tey berandi elementini í bygninginum skulu ikki bert hava eina statiska funktión, men skulu eisini verða dekorativ.

Hetta gevur bygninginum dám av einari léttari konstruktión, ið fellur væl í umhvørvið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 300.000,00 av íløgum til byggiskrá.

**Mentamálanevndin 14. juni 2005:** Samtykt at seta ein arbeiðsbólk at gera byggiskrá til bygging av ítróttarbygningi at hýsa m.a. fimleikahallir í norðara enda av Tórsvølli. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við umboðum fyri teknisku fyrisitingina og trivnaðarfyrisitingina.

Í sambandi við byggiskrá fyri bygningin skal hetta gerast í samstarvi við avvarðandi partar og feløg.

Byggiskráin verður at leggja fyri nevndina 19. oktober 2005.

Samtykt at seta kr. 300.000,00 av íløgunum til ger av byggiskrá.

Málið verður lagt fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005**: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu**.**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna byggiskránna, dagfest oktober 2005, sum verður løgd fram á fundinum.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2005:** Málið varð framlagt av Robert Thomassen, arkitekti, og verður viðgjørt á einum seinni fundi.

**Mentamálanevndin 25. oktober 2005:** Nevndin viðgjørdi byggiskránna, og sendir hana, smb. Politisku-fyrisitingarligu mannagongdini,

- í byggi- og býarskipanarnevndina at viðgera og góðkenna økið,
- í teknisku nevnd til viðgerð og góðkenning av tekniska partinum og

- í fíggjarnevndina at útvega lendi.

Síðani verður málið lagt fyri mentamálanevndina aftur, at taka støðu til byggiskránna og útbjóðingarhátt.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at góðtaka byggiskránna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna byggiskránna, og at kunna grannarnar.

**Ískoyti:**
Málið verður viðgjørt á fundi í ferðslunevndini 9. november 2005. Býarverkfrøðingurin kemur við tilmæli á fundium í teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at í byggiskránni fyri fimleika bygging við Tórsvøll, skulu framtíðar ferðslu- og parkeringsviðurskiftini verða frá økinum norðan fyri ÍSF-húsini. Verður bundið í verandi pláss norðan fyri Svimjihøllina, verður atkomuligt til HB- og B36 húsini.

Mælt verður eisini til at eingin almenn ferðsla eigur at verða á økinum við nýggja Torgið. Tó skal sjúkraflutningur og annar bráðfeingis flutningur at verða loyvdur á økinum.

**Tekniska nevnd 23. november 2005:** Nevndin samtykti at beina málið aftur í arbeiðsbólkin, sum settur varð av mentamálanevndini 14. juni 2005, við ynski um at fáa eina ítøkiliga vegatekniska loysn við kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við nevndina fyri Grunnin Tórsvøll, sum er sinnað at leiga nøktandi lendi til ítróttabygging og at gera leiguavtalu.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at gera avtalu við Grunnin Tórsvøll um leigu av neyðugum lendi.

- Býarverkfrøðingurin hevur á fundi við arbeiðsbólkin umrøtt spurningin um ymsar vegatekniskar loysnir. Greitt verður frá málinum á felagsfundi millum mentamálanevndina og teknisku nevndina.

**Tekniska nevnd 8. desember 2005:** Nevndin samtykti at viðmæla fyriliggjandi byggiskrá.

Nevndin samtykti eisini, at umsitingin letur gera uppskot til vegatekniska loysn at leggja fyri nevndina aftur.

**Mentamálanevndin 8. desember 2005:** Nevndin samtykti at góðkenna byggiskránna og at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta 500.000,- kr. Til projektering.

**Ískoyti**
Í sambandi við at kommunan støðugt arbeiðir við at menna leistin fyri hvussu byggimál hjá kommununi skulu skipast, og havandi í huga, at tað í hesum sambandi, er umráðandi at ymiskar royndir verða gjørdar, so at valmøguleikar í sambandi við útbjóðing av arbeiðum í kommununi, eru sannførandi og so nógvir sum gjørligt, mælir býararkitekturin til at býráðið umhugsar annan leist enn tann, ið er umrøddur í mentamálasamtyktini 8. des. 2005.

Ístaðin fyri at lata gera prosjekt at lata til virkir at bjóða eftir, metir býararkitekturin at nevnda bygging er vælegnað til at lata gera sum heildararbeiðstøku (totalentreprisu), har kommunan við støðið í byggiskránni bjóðar 4- 5 virkjum at gera uppskot til loysn. Tó skal ein slík loysn gerast sum samskipar arbeiðið við Tórshavnar kommunu og Tórsvøll. Hetta eigur tó ikki at vera nøkur forðing, og kann avgreiðast við innleiðandi samskifti, har fortreytirnar fyri snið og funktión verður útgreinaðar beinanvegin.

**Tilmæli:**
Grundað á omanfyrinevnda, mælir býararkitekturin til at arbeiðið at gera fimleikabygging við norðurendan av Tórsvøll, verður framt sum heildararbeiðstøka bjóðað út millum 3 føroysk virkir og 2 útlendsk virkir fyri at tryggja kapping við atliti til eitt fyri Tórshavnar kommunu nøktandi kostnaðarstøðið. Í hesum sambandi eigur kommunan tó at tilskila sær rætt til ikki at taka av nøkrum av tilboðunum, men má tá gera sær greitt at talan er tá um at arbeiði ikki kann bjóðast út aftur í tíðarskeið uppá 6 mðr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum hjá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 14. desember 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ein minniluti:** Bjarti Mohr mælir til einans at bjóða arbeiðið út millum føroyskar fyritøkur, men tekur annars undir við tilmælinum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við meiri-lutatilmælinum í mentamálanevndini og at velja Hildur Eyðunsdóttir og Sjúrður Olsen í bygginevndina eftir reglunum í § 36 í kommunulógini.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Magnus Hansen, arkitektur, kunnaði um málið.

**Mentamálanevndin 26. juni 2006:** Tikið av skrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at bygginevndin verður biðin um at útvega tilrættaða byggiskrá, um so er, at nevndin ynskir at broyta verkætlanina í mun til

upplýsingarnar um broyttan hølistørv, sum eru fingnar til vega í samskiftinum við m.o. fimleikarfeløgini síðani fyriliggjandi byggiskrá frá oktober 2005. Talan er um eina fermetraøking á uml. 63 %.

Eisini verður mælt til, at málið um staðseting av fimleikarahøll við Tórsvøll verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd saman við heildarætlan fyri Tórsvøll, sum grunnurin fyri Tórsvøll hevur latið býráðnum.

**Mentamálanevndin 4. oktober 2006:** Samtykt at biðja tekniska stjóran og býararkitektin ummæla nýggja uppskotið, dagfest 27. september 2006, til fimleikabygging v.m. við Tórsvøll til næsta fund.

**Mentamálanevndin 29. november 2006:** Jákup Egholm Hansen, tekniskur stjóri og Mikael Viderø, býararkitektur, løgdu fram ummæli – fimleikahøll við Tórsvøll, dagfest 29. november 2006.

Samtykt at kanna møguleikan at byggja fimleikabygning til amboðs- og rútmiskan fimleik á einum øki við Landavegin, sum er avlagt til ítróttarendamál. Eisini samtykt at hesin møguleiki skal viðgerast saman við fimleikafeløgunum, og at atlit skulu takast til altjóða krøv.

**Ískoyti:**
Byggideildin hevur endurskoðað ætlanina um at byggja fimleikabygning við norðara enda av Tórsvølli og gjørt uppskot til nýggja skitsu. Uppskotið er grundað í byggiskránni og leystlig kostnaðarmeting er innanfyri upprunaligu metingina.

Bygginevndin tekur undir við uppskotinum og hevur avgjørt at leggja málið til mentamálanevndina til kunningar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gjøgnumføra tilmælið hjá býararkitektinum frá 14. desember 2005.

**Mentamálanevndin 17. apríl 2007:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at góðkenna byggiskránna fyri fimleikabygging við Tórsvøll.

Víst verður samstundis til býráðssamtykt 15. desember 2005 um útbjóðingarhátt og nevndarval.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 23. apríl 2007:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 14. november 2007:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Inn komu 2 uppskot. MT Højgaard og Articon/Pihl lótu inn tilfar.

*Prísirnir á uppskotum*
Uppskotið hjá MT Højgaard er áljóðandi kr. 44.986.106,- uttan MVG og ókent

Uppskotið hjá Articon/Pihl er áljóðandi kr. 53.625.000,- uttan MVG og ókent

*Vinnandi uppskotið*
Bygginevndin staðfesti úrskurðin hjá Dómsnevndini. Dómsnevndin metti, at uppskotið hjá MT Højgaard er eitt gott svar uppá ynskini hjá Tórshavnar kommunu til Fimleikabygging, og góð loysn fyri einum framtíðar Tórsvølli og Ítróttartorgið móti Svimjihøllini.

*Fundir við áhugabólkar*
Bygginevndin hevur havt fund við umboð fyri grunnin fyri Tórsvøll og fimleikarafeløgini, har hesi fingu høvi at gera sínar viðmerkingar.

Umboðini fyri fimleikarafeløgini vóru væl nøgd við uppskotið og høvdu einki at finnast at.

Umboðini fyri grunnin fyri Tórsvøll gjørdu millum annað vart við, at spurningurin um goymslupláss til Tórsvøll ikki var loystur í uppskotinum frá MT Højgaard.

Sambært byggiskránni var innteknað økið til goymslu til Tórsvøll í einum Hornabygningi. Hesin hornabygningur og goymsla vóru ikki undir yvirlitinum undir Evni og vídd punkt 4.4, men bert sum diagramm saman við tekningunum.

Um Tórsvøllur skal hava goymslu í hornabygninginum, eigur ein samráðing av fara fram við MT Højgaard.

Umboðini fyri grunnin fyri Tórsvøll vístu eisini á, at ikki er neyðugt við fleiri áskoðaraplássum.

**Tilmæli:**
Bygginevndin biður um heimild til at loyva umsitingini, at samráðast við MT Højgaard um ein sáttmála til bygging av Fimleikabygningi við Tórsvøll, sum skal taka støði í innkomna uppskotinum, har hædd verður tikin fyri manglum í mun til byggiskránna og viðmerkingum frá grunninum fyri Tórsvøll.

**Mentamálanevndin 28. november 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini, tó soleiðis at bygginevndini verður heimilað at samráðast saman við umsitingini.

**Býráðið 13. desember 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 6. mai 2008:** Útsett.

***Uppískoyti***
Samandráttur av málsgongd síðani seinastu viðger í býráðnum.

- Nov. 2007 Tvey tilboð um bygging koma inn í nov. 2007. MT Højgaard hevur lægsta tilboð áljóðandi 44.986.106,- kr.
- Jan. 2008 Samráðingar byrja við MTH um uppskot við tillagingum.
- Mars 2008 MTH letur inn nýtt uppskot við hornabygningi áljóðandi uml. 6,5 mill. Harafturat eru ymiskar prísásetingar á veitingar í byggingini s.s. innandura- og uttandura tribunir, spegl, elevator, fallveggir v.m.
- Apríl 2008 MTH ger nýtt uppskot við alternativari loysn til tak á fimleikabyggingini. Alternativur hornabygningur á uml. 3 mill. er eisini teknaður.
- Framhaldandi samráðingar við MT-Højgaard um tillagingar av sáttmálanum umframt viðurskifti, ið ikki eru við í upprunatilboðnum, t.d. fallveggur, tribunir innan. Samskifti við fimleikarafeløg at tryggja at høllin lýkur møgulig nýggj krøv til altjóða kappingar.

Bygginevndin mælir til, at man heldur fast um upprunauppskotið frá nov. 2007, men at víðkað tilboðið til eisini at umfata fallveggir millum hallirnar, gólvdekk til grøv og innandurða tribunu.

Harafturat eigur at verða bygdur ein hornabygningur at nýta til goymslurúm hjá Tórsvølli.

Samlaðu útreiðslurnar til fimleikabyggingina verður við hesum:

**Fimleikarahallir**
Fimleikabygging tilboð nov. 2007 kr. 44.986.106,-

Manglar í mun til tilboð:
Fallveggir at uppdeila ymisku rúmini kr. 660.000,-
Gólvdekk til grøv kr. 800.000,-
Tribunir innan kr. 679.000,-

Tilsamans kr. 47.125.106,-

Avsetast til ókent 10% kr. 4.712.511,-
Avseta til list 1,5 % kr. 706.877,-
Mvg 6,25 % kr. 2.811.631,-
Projekt, eftirlit, byggileiðsla v.m. kr. 250.000,-

**Tilsamans við mvg, list og ókendum kr. 55.606.125,-**

**Hornabygningur**

| | | |
|---|---|---|
| Hornabygningur | kr. | 2.930.000,- |
| Avsetast til ókent 10 % | kr. | 293.000,- |
| Mvg 6,25 % | kr. | 183.125,- |

**Tilsamans við mvg og ókendum kr. 3.406.125,-**

Bygginevndin er av teirri fatan, at kostnaðurin fyri Fimleikabygging eigur at verða sæddur í eini heildarætlan fyri økið í Gundadali og við Tórsvøll.

Kostnaðurin at byggja fimleikabyggingina er sera nógv tengdur at staðsetingini, har neyðugt er at byggja við umleið 7 – 8 metrar høgum stuðlaveggi. Harafturat verður bygningurin fyrireikaður til framtíðarbygging omaná Fimleikabyggingina. Hornabygningurin er til goymslu til Tórsvøll, men eisini fyrireikaður til framtíðarbygging omaná.

Samanumtikið eru stórar útreiðslur tengdar at Fimleikabyggingini, ið bygginevndin metir verða skilagóðar at gera, hóast hesar útreiðslur ikki beinleiðis eru til fimleikarabyggingina. Nevnast kunnu hornabygningurin til Tórsvøll, áskoðarapláss á norðursíðu av Tórsvølli, byggibúgving av grundstykki omaná fimleikarabygningin.

Torført er at seta tøl á hesar íløguútreiðslur, ið annaðhvørt onnur seinni fáa ágóðan av, ella har íløgan kann fella burtur um bygt verður omaná beinanvegin, men bygginevndin hevur biðið um at fáa eina optión í sáttmálan á 3 mánaðir, sum leggur upp fyri at byggjast kann omaná beinanvegin.

**Tilmæli frá bygginevndini**
Bygginevndin mælir til at taka av sáttmálanum við MT Højgaard um fimleikarahøll við Tórsvøll og játta kr. 19 mió. av íløgum til ítrótt og frítíðarvirksemi í 2008, og kr. 36.606.125 í 2009.

Harafturat mælir bygginevndin til at játta kr. 3.406.125 til hornabygning at nýta til goymslu hjá Tórsvølli av íløgum til ítrótt og frítíðarvirksemi í 2009.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við bygginevndini og mæla býráðnum umvegis fíggjarnevndini til at játta kr. 19 mió av íløgum til ítrott og frítíðarvirksemi í 2008 og kr. 36.606.125 í 2009 til fimleikarabygging við Tórsvøll.

Eisini verður mælt til at taka undir við bygginevndini og mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at játta kr. 3.406.125 til hornabygning at nýta til goymslu hjá Tórsvølli av íløgum til ítrott og frítíðarvirksemi í 2009.

**Mentamálanevndin 17. juni 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2008:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal mæla til at taka undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen metur seg ikki kunna taka støðu til málið, vísandi til at talan er um eina íløgu á 60 mió. kr. og at eingin íløguætlan fyri komandi árini fyriliggur.

**Býráðið 19. juni 2008:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Kári Árting, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Høgni Mikkelsen, býráðslimur biður um hetta málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Eftir at heildararbeiðstøkusáttmáli varð undirskrivaður við MT Højgaard Føroyar P/F, fór arbeiðstakarin undir projekteringsarbeiði eftir summarstøðgin í 2008.

Umsøkn um gravi- og stoypiloyvi varð latin kommununi 19. sept. 2008, og var hetta játtað hin 07. okt. 2008. Hin 1. okt. 2008 kom umsøknin um byggiloyvi. Hetta er ikki avgreitt enn, tí MTH hevur ikki fingið øll viðurskifti uppá pláss. Hin 3. nov. 2008 var spakin settur í, og fór arbeiðstakarin tá undir fyrireikingar av byggiplássinum. Graviarbeiði byrjaði fyrst í des. 2008.

Longu í nov. 2008 tók ósemja seg upp við MT Højgaard um ymisk viðurskifti.

Hin 19. febr. 2009 staðfesti kommunan í samband við eina vitjan á byggiplássinum, at stuðlamúrurin norðureftir, sum tá varð í gerð, ikki bleiv gjørdur sum avtalað í sáttmálanum, og var MT Højgaard longu dagin eftir biðið um eina frágreiðing um hetta. Bygginevndin viðgjørdi svarið frá MTH, og boðaði við skrivið hin 06.03.09 frá, at kommunan góðkendi ikki stuðlamúrin. Bygginevndin kravdi eisini, at fáa alt prosjekttilfar og útrokningar útflýggja, og varð tilfarið síðani latið Landsbyggifelagnum at eftirkannað.

Síðani hevur verið eitt langt og drúgt samskifti um málið. Trý tillaga uppskot til loysn viðv. stuðlamúrinum eru gjørd av MTH, men onki teirra verður viðmælt av LBF. Eisini vísti gjøgnumgongdin hjá LBF av prosjekttilfarinum, at eisini onnur viðurskifti vóru ógreið.

Bygginevndin hevur tí við skrivið dagfest 10. juni 2009 boða MTH frá, at um ikki arbeiði verður støðga beinanvegin til øll viðurskifti eru loyst á nøktandi hátt, og avtala verður gjørd um ymisk viðurskifti – herundir fíggjarligu avleiðingarnar av støðuni - vil bygginevndin mæla faknevnd og býráðið til at uppsiga sáttmálan við MTH (skjal nr. 2004-1691/86) Freistin hjá MTH at svara var sett til 16. juni 2009.

**Tilmæli:**
Bygginevndin leggur málið fyri mentamálanevndina við tilmæli at útvega eitt juridiskt responsum, grundað á svarskriv frá MTHøjgaard, dagfest 16. juni 2009.

**Mentamálanevndin 16. juni 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini og beina málið í fíggjarnevndina til kunningar.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2009:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Frágreiðing verður á fundinum um málið, grundað á nýtt svarskriv frá MTH, dagfest 18. juni 2009 og 19. juni 2009, j. nr. 2004-1691/91.

**Tilmæli:**
Við støði í, at MT Højgaard Føroyar í sínum samskifti við umsitingina síðani svarskriv teirra frá 16. juni 2009 hevur givið til kennar, at teir góðtaka stórt sæð allar treytir byggiharrans í skrivinum frá 10. juni 2009, og í løgfrøðiliga uppritinum frá 24. juni 2009, sum tekur útgangsstøði í hesum samskiftinum, mæla trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á Løgdeildini til, at nevndin fyribils ikki hevar sáttmálan, men at umsitingin fær heimild at samráðast við arbeiðstakaran um eina fyri byggiharran nøktandi ískoytisavtalu.

**Mentamálanevndin 24. juni 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið aftur í bygginevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin samtykti á fundi 24. juni 2009 at heita á Jákup Egholm Hansen, tekniska stjóra um at taka upp samband við MTH um at fáa í lag eina fyri byggiharran nøktandi ískoytisavtalu.

Tekniski stjórin hevur samráðst við MT Højgaard Føroyar um ískoytisavtalu og latið bygginevndini upplegg til avtalu at viðgera.

Bygginevndin hevur viðgjørt málið um alnótina 25. juni 2009, og samtykt at mæla mentamálanevndini at taka undir við upplegginum til ískoytissáttmála við MT Højgaard Føroyar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini um at góðkenna uppleggið frá tekniska stjóranum til ískoytisavtalu við MT Højgaard Føroyar.

**Mentamálanevndin 25. juni 2009:** Samtykt um alnótina at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2009**: Kunnað varð um málið.

**Býráðið 25. juni 2009:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniski stjórin og umsitingin hava í samráð við bygginevndarformannin havt samskifti við arbeiðstakaran um dagførda tíðarætlan, gjaldsætlan o.a. Á fundi við arbeiðstakaran 14.09.09 var arbeiðstakarin biðin um at gera eina ítøkiliga uppgerð av hvørjar spilldagar/eykadagar hann metti seg hava rætt til sambært ABT93. Hesa uppgerð hevur arbeiðstakarin gjørt og sent kommununi (skjal nr. xx), og uppgerðin vísir fylgjandi krav frá arbeiðstakaranum:

| | | |
|---|---|---|
| SEV ledning - antal dage: | 15 | |
| Sikring af B-36 - antal dage: | 2 | |
| Udskiftning af blød bund – antal dage: | 15 | |
| Afløbsledninger og brønde i skrænt – antal dage | | 8 |
| Omlægning af eksisterende ledning – antal dage | | 8 |
| Fjern muld omkring ledning - antal dage | | 1 |
| Tilslutning af afløb og dræn | 15 | |
| Vinter uge 7 – antal dage | 5 | |
| Ændring springgrav og trampolingrav – antal dage | | 10 |
| Samlet antal dage: | 79 | |

Tekniska umsitingin hevur mett um kravið, og metir at 49 dagar kunnu góðkennast uttan viðmerkingar. Hinvegin metir umsitingin, at kravið á 15 dagar fyri bleytt undirlag, og kravið á 15 dagar fyri íbinding av frárenningum og kloakk má takast upp við arbeiðstakaran áðrenn endalig avgerð verður tikin.

Vísandi til "Politisk fyrisitingarlig mannagongd fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum" og §3, stk. 2 í "Fundarskipan fyri bygginevndir", skal bygginevndin leggja spurningar um tíðarleinging fyri viðkomandi føstu nevnd til støðutakan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til í fyrstu atløgu at góðkenna tíðarfreistleingin á 49 dagar, og at umsitingin tekur upp samráðingar við arbeiðstakarin um omanfyri nevndu 30 dagarnar í kravið arbeiðstakarans, at leggja fyri nevndina aftur til støðutakan.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2009:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Vísandi til tilmæli til fundin í mentamálanevndini 21. okt. 2009, hevur umsitingin viðgjørt uppgerð arbeiðstakarans av spilldøgum/eykadøgum ið hann metti seg hava rætt til sambært ABT93. Úrslitið av nýggju gjøgnumgongdini er, at 16 dagar í fyrstu uppgerðini yvirlappað onnur arbeiðir sum vóru í gongd samstundis, og er samlaða kravið tí lækkað úr 79 døgum til 63 dagar, sambært niðanfyristandandi talvu.

| | |
|---|---|
| SEV ledning - antal dage: | 15 |
| Afløbsledninger og brønde i skrænt – antal dage | 8 (yvirlappað aðrar dagar) |
| Sikring af B-36 - antal dage: | 2 |
| Udskiftning af blød bund – antal dage: | 15 |
| Omlægning af eksisterende ledning – antal dage | 8 |
| Fjern muld omkring ledning - antal dage | 1 |
| Tilslutning af afløb og dræn | 15 |
| Omlægning af eksisterende ledning – antal dage | 8 (yvirlappað aðrar dagar) |
| Vinter uge 7 – antal dage | 5 |
| Ændring springgrav og trampolingrav – antal dage | 10 |
| Samlet antal dage: | 63 |

Viðmerkjast skal, at fyri teir 10 dagarnir til broyting av springgrøv og trampolingrøv, er gjørd ein serlig avtala við arbeiðstakaran um, at hann samstundis strikar sítt fíggjarliga krav á uml. kr. 120.000 fyri hesa broyting.

Bygginevndin hevur viðgjørt málið, og góðkennir nýggju uppgerðina.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til, at umsitingin fær heimild at gera endaliga avtalu við arbeiðstakaran um tíðarfreistleinging upp til 63 dagar fyri omanfyristandandi arbeiðir, sum partur av eini endaligari avkláring um tey fíggjarligu krøv sum semja ikki er fingin um enn.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðstakarin, MTH, hevur skrivliga fráboða, at teir meta seg hava krav um spilldagar. Serliga í samband við nógv regn tá dúkur skuldi sveisast omaná takið, har teir meta seg hava rætt til 20 spilldagar, umframt at nýggi Pulastic gólvbelegningurin í fimleikahøllini krevur, at teir fáa 5 eyka arbeiðsdagar, har ikki aðrir arbeiða á gólvinum. Við útgangsstøði í hesum kravið, sær tíðarætlanin hjá MTH fyri avleveringar soleiðis út:

- Fimleikabygningurin 07.05.10
- Uppfylling norðanfyri 02.07.10
- Hornabygningurin 02.07.10
-

Bygginevndin var samd um, at fimleikabygningurin eigur at verða liðugur um mánaðarskifti apríl-mai, og at hann skuldi kunna takast í nýtslu beinanvegin tá til FM í

fimleiki. Viðv. uttanumsøkinum var nevndin samd um, at uttanumsøkið skuldi verða liðugt tíðliga í viku 25 (21.-27.juni).
Samtykt var at mæla mentamálanevndini til partvíst at góðkenna kravið hjá MTH við støði í omanfyristandandi fortreytum.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til, partvíst at góðkenna kravið hjá MTH við støði í omanfyristandandi fortreytum.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Bygningurin var liðugur og tikin í nýtslu í juni 2010.
Av játtanini standa kr. 605.000 eftir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at loka málið og flyta avlopið til kontu 6175 L61002 keyp av bygningum frá BankNordik.

**Mentamálanevndin 27. november 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið um býráðið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. november 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 28. november 2013:** Einmælt samtykt.

**239/13** **<u>2013-2207</u>**

**<u>Kommustýrisskipanin fyri Tórshavnar kommunu</u>**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Umrøtt.

**Býráðið 16. september 2013:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 13. november 2013:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 28. november 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við niðanfyristandandi broytingum av kommunustýrisskipanini fyri Torshavnar kommunu:

**Uppskot til broytingar í Kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu**
**(ásetingar um samsýningar og økisnevnd)**

**§ 1**

Í kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu frá 16. apríl 2001, sum seinast broytt við býráðssamtykt frá 13. desember 2012, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 9, 1. petti verður orðað soleiðis:

”**1. petti.** Býráðið kann seta serstakar ráðgevandi nevndir og staðbundnar nevndir, ið skulu taka sær av ávísum málum ella gera fyrireikandi ella ráðgevandi arbeiði fyri býráðið, fíggjarnevndina ella hinar føstu nevndirnar, sí 6. part.”

2) § 11, 2. petti verður orðað soleiðis:

**”2. petti.** Hvør nevnd sendir, um teknisku nevnd og fíggjarnevndina, tilráðing til býráðið viðvíkjandi íleggingararbeiði, ið hoyrir undir hennara fyrisitingarøki.”

3) Í 6. parti verður eftir yvirskriftina sett sum nýggj § 27a:

**”§ 27a**
**Økisnevndin**

**1. petti.** Undir fíggjarnevndini verður sett ein økisnevnd við 5 kommunustýrislimum, ið skal viðgera
og taka stig til at dagføra og menna bygdirnar í kommununi.
**2. petti.** Nevndin arbeiðir í høvuðsheitum yvirskipað og tvørgangandi.
**3. petti.** Nevndin orðar økismenningarpolitikk fyri kommununa og setir ítøkilig mál fyri tey einstøku økini.
**4. petti.** Nevndin leggur síni tilmæli fyri fíggjarnevndina at bera víðari í skipanini.

4) Í § 37 verða 11. og 12. petti orðað soleiðis:

”**11. petti.** Árliga fasta samsýningin til formenn í føstu nevndunum sambært 5. parti er 12,5 % av teirri samsýning, ið borgarstjórin fær sambært, sbr. 1. petti.

Árliga fasta samsýningin er tá fyri alt arbeiði í avvarðandi nevnd.

**12. petti**. Árliga fasta nevndarsamsýningin til býráðslim, sum er limur í einari av føstu nevndunum ella fíggjarnevndini er 17 ferðir upphæddina í § 2, stk. 2, nr. 3, í kunngerðini um samsýning.

5) Í § 37, 13 petti, verður sett sum nýtt 3. stk.:

"Kommunustýrislimur, ið er nevndarformaður í Økisnevndini, sbr. § 27a, fær hóast stk. 1 eina árliga fasta samsýning, sum er 3 ferðir nevndarsamsýningina sambært § 6, stk. 2, nr. 5, í kunngerðini um samsýning Árliga fasta samsýningin er tá fyri alt arbeiði í nevndini."

6) § 37 verður, 1. stk. í 17. petti orðað soleiðis:

"**17. petti.** Býráðið og føstu nevndirnar kunnu taka avgerð um, at kommunustýrislimur kann luttaka á skeiði, kunningarferð, umboðan v.m., bæði innan- og uttanlands. Tá verður samsýning, ella um viðkomandi kommunustýrislimur ynskir hetta, endurgjald latið eftir reglunum í § 4 í kunngerðini um samsýningar."

**§ 2**

Broytingarnar koma í gildi eftir at hava verið viðgjørdar á tveimum býráðsfundum, við minst 14 daga millumbili og broytingarnar í nr. 4 av § 37, 11. og 12. petti og í nr. 6 av § 37,

**Almennar viðmerkingar**

Kunngerðin um samsýningar varð broytt/lýst av nýggjum síðst í juni mánað 2013 eftir ynski frá Tórshavnar kommunu. Broytingarnar komu í gildi 29. juni 2013, men hava virknað frá 1. januar 2013.

Endamálið við broytingum í kommunustýrisskipanini er serliga at tillaga og dagføra samsýningarnar til nevndarlimir og nevndarformenn, nú bygnaðurin í Tórshavnar kommunu er broyttur pr. 1. januar 2013, har færri fastar nevndir nú eru til at taka sær av beinleiðis umsitingini.

Áðrenn bygnaðarbroytingarnar vóru 7 fastar nevndir, men síðan 1. januar eru 5 fastar nevndir, íroknað fíggjarnevndina.

Við broytingini í kunngerðini um samsýningar er rúm fyri at nevndarlimir og nevndarformenn kunnu fara nakað upp í samsýning, og verður hetta samanhildið við, at føstu nevndirnar nú eru 5 heldur enn 7 í tali, er rúm fyri munandi hækking til nevndarformenninar, tí mesta samanlagda samsýningin til nevndarformenninar er altíð avmarkað til í mesta lagi helvtina av teirri samsýning, ið borgarstjórin fær, og við færri nevndum verður rúm fyri hægri samsýning til hvønn formannin.

Fyri at samsýningarnar kunnu verða dagførdar er neyðugt at samtykkja broytingar í kommunustýrisskipanini § 37, 11., 12. og 13. petti. Hetta er orsøkin til uppskotið.

Samsýningin til formenn í føstu nevndunum (undantikið fíggjarnevndini, har borgarstjórin er føddur formaður) er sambært § 37, 11. petti í galdandi kommunustýrisskipan ásett til 3 ferðir mest loyvdu nevndarsamsýning. Henda upphædd er í dag kr. 4.725 kr/mðn, sum er mest loyvda samsýning.

Við uppskotinum verður mælt til, at teir fýra formenninir í føstu nevndunum fáa eina samsýning á 12,5 % av borgarstjóralønini, ið svarar til 6.583,- kr./mðn.

Mest loyvda fasta samsýningin til allar nevndarformenn eftir kunngerðini er 50 % av borgarstjóralønini, svarandi til 12,5 % av borgarstjóralønini til hvønn formannin í føstu nevndunum, um allir fýra nevndarformenninir fáa somu samsýning, svarandi til 6.563 kr/mðn til hvønn.)

Árliga fasta samsýningin til nevndarlimir í § 37, 12. petti í galdandi kommunustýrisskipan er ásett til 12 ferðir hægsta fundarpening. Nú kunngerðin er broytt, verður skotið upp at hækka hetta til 17 ferðir hægsta fundarpening, sum svarar til nýggja loftið eftir § 6, stk. 2, nr. 5 í kunngerðini. Hetta er ein hækking úr kr. 1.575,- um mánaðin til kr. 2.231,- um mánaðin.

Í uppskotinum er eisini ein áseting um samsýning til formannin í Økisnevndini sambært § 27a. Hetta er broyting nr. 5 til § 37, 13. petti. Við ásetingini fær formaðurin í Økisnevndini eisini fasta samsýning, ið er 3 ferðir nevndarsamsýningina sambært § 6, stk. 2, nr. 5, í kunngerðini um samsýning. Hetta svarar til eina upphædd á kr. 4.725,- um mánaðin, sum er sama samsýning, sum formenn í føstu nevndunum fáa í dag, t.e. áðrenn uppskotnu hækkingarnar omanfyri.

Vanligir limir í Økisnevndini fáa fundarpening eftir teim reglum, sum eru galdandi frammanundan, sí § 37, stk. 1 í 13. petti.

Broytingarnar eru sostatt í fyrra lagi í § 37, 11., 12. og 13. petti, men 17. petti verður eisini umorðað nakað, tí endurgjaldssatsurin er hækkaður úr kr. 1.500,- til kr. 1.800,- og við broytingini verður gjørt greiðari, at latið verður upp til tann einstaka kommunustýrislimin, um hann krevur endurgjald heldur enn samsýning fyri skjalprógvaða mista inntøku orsakað av fundum og øðrum virksemi.

Broytta kunngerðin og uppskotið til broytingar í kommunustýrisskipanini merkja, at nevndarlimir og nevndarformenn í føstu nevndunum (men ikki limir í Økisnevndini, ið verður stovnsett við hesi broytingini) fáa rætt til at fáa munin millum lægru samsýningarnar og hækkaðu samsýningarnar eftirgoldnar frá 1. januar 2013, tí kunngerðin hevur fingið virknað frá 1. januar 2013.

Harumframt er onkur minni teknisk broyting í uppskotinum, sí serligu viðmerkingarnar.

Fíggjarligu avleiðingarnar av broytingunum eru, at einstakir nevndarlimir í mesta lagi fáa eina samsýning á kr. 2.231 kr/mðn, móti 1.575 kr/mðn. eftir galdandi reglum, svarandi til eina mánaðarliga hækking á 656 kr/mðn. Kr. 2.231 er mest loyvda samsýning sambært kunngerðini.

Fyri formenn í føstu nevndunum merkir broytingin, , at hvør av teim 4 formonnunum (borgarstjórin undantikin) kann fáa eina formanssamsýning á kr. 6.583 kr/mðn, móti 4.725 kr/mðn eftir galdandi reglum. Hetta svarar til eina mánaðarliga hækking á 1.858 kr/mðn fyri hvønn nevndarformannin. Upphæddirnar kunnu ikki verða hægri, tí samanløgdu samsýningarnar til nevndarformenninar harvið svarar til 50 % av borgarstjóralønini, ið er maksimum sambært kunngerðini.

Broytingin hevur við sær, at formaðurin í Økisnevndini fær fasta samsýning á kr. 56.700 árliga, svarandi til kr. 4.725 um mánaðin. Vanligir limir í Økisnevndini fáa fundarpening eftir teim reglum, sum eru galdandi frammanundan, sí § 37, stk. 1 í 13. petti.

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**

Ad 1)
Tilvísingin í galdandi kommunustýrisskipan er til §§ 28, 29 og 30. Rættari er at vísa til allan 6. Part ella ikki at vísa til aðra grein yvirhøvur. Talan er einans um tekniska broyting.

Ad 2)
Í galdandi kommunustýrisskipan er byggi- og býarskipanarnevndin nevnd her. Rætta nevndin er Tekniska nevnd, og tí er orðingin rættað.

Ad 3)
Við broytingini verður Økisnevndin regulerað í mun til manning og uppgávur.
Av tí at nevndin er tikin við undir 6. part í kommunustýrisskipanini er somuleiðis greitt, at talan er ikki um fasta nevnd.

Ad 4)
Við broytingini í 11. petti, 1. stk. fylgir samsýningin teirri til eina og hvørjari tíð galdandi borgarstjóraløn.

12,5 % av borgarstjóralønini svarar til, at teir 4 nevndarformenninir (borgarstjórin/fíggjarnevndarformaðurin undantikin) samanlagt fáa eina samlaða fasta samsýning, sum svarar til helvtina av borgarstjóralønini.

Við ásetingini í 11. petti, 2. stk., verður gjørt greitt, at nevndarformenn, ið fáa fasta samsýning, ikki hava rætt til aðra samsýning fyri arbeiði í avvarðandi nevnd.

Við broytingini av 12. petti hækkar samsýningin til nevndarlimir úr 15 upp í 17 ferðir upphæddina í § 2, stk. 2, nr. 3, í kunngerðini um samsýning.

Ad 5
Við broytingunum í 13. petti verður samsýningin til formannin í Økisnevndini umrødd í einum nýggjum stk. 3, og harvið hevur nevndarformaðurin í teirri nevndini rætt til eina fasta samsýning sum formaður.

Ad 6)
Endurgjaldið er sambært kunngerðini um samsýningar hækkað úr kr. 1.500 til í mesta lagið kr. 1.800 fyri hvønn dagin. Einasta broyting er, at 17. petti er orðað soleiðis, at viðkomandi limur kann krevja at fáa endurgjald heldur enn samsýning.

**Til § 2**

Bygnaðarbroytingarnar, ið kommunan framdi við ársbyrjan 2013, tá valskeiðið eisini byrjaði, vóru beinleiðis orsøkin til broytingarnar í kunngerðini og til tað, at kunngerðin fekk virknað frá 1. januar 2013.

Tí er í § 2 ásett, at broytingarnar í § 37, 11., 12. og 17 petti í kommunustýrisskipanini eisini hava virknað frá 1. januar 2013, soleiðis at hægru samsýningarnar í tíð fella saman við broytta bygnaðinum. Hetta er tó bara galdandi fyri broytingarnar, sum snúgva seg um samsýning til nevndarformenn og nevndarlimir í føstu nevndunum og viðvíkjandi rættinum til endurgjald fyri skjalprógvaða mista inntøku orsakað av fundum og virksemi v.m. Ásetingarnar um Økisnevndina og samsýningar í tí sambandinum eru sostatt ikki fevndar av ásetingini um virknað frá 1. januar 2013, men fáa ikki virknað fyrr enn tann dagin tær eru endaliga samtyktar av býráðnum.

Broytta kunngerðin og uppskotið til broytingar í kommunustýrisskipanini merkja sostatt, at nevndarlimir og nevndarformenn í føstu nevndunum fáa rætt til at fáa munin millum lægru samsýningarnar og hækkaðu samsýningarnar eftirgoldnar frá 1. januar 2013, tí arbeitt hevur verið síðan 1. januar undir nýggja og broytta bygnaðinum. Sama er galdandi fyri kommunustýrislim, sum heldur enn samsýning ynskir at fáa endurgjald eftir reglunum í § 4 í kunngerðini um samsýningar.

**Býráðið 28. november 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum til broytingar av kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu.

**FUNDUR LOKIN KL. 20.15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Elin Lindenskov | Levi Mørk |
| Helena Dam á Neystabø | Sigrún Mohr | Tróndur Sigurdsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andresen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| | Heðin Mortensen | |